

# IRF

## ÁRSFRÁSØGN 2023

# Innihald


Upplýsingar um felagsskapin ..... 4
IRF fyriskipan ..... 5
Limakommunur og fólkatal ..... 6
Leiðslufrágreiðing ..... 7
Hendingar í árinum ..... 12
Áhugin at vitja IRF veksur støðugt ..... 13
Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum á vitjan ..... 14
IRF vitjar miðnámsskúlar ..... 15
Fleiri ung í summarstarvi hjá IRF ..... 15
Nýggj skiljiskjátta á irf.fo ..... 16
IRF-dagur fyri nýggj starvsfólk ..... 16
Nýggjur faldari frá IRF ..... 18
Tiltak fyri kommunal bingju- og endurvinningarpláss ..... 18
Kanning av gráa posa ..... 20
Týdningarmesta tilfeingið hjá IRF er starvsfólkini ..... 22
Felags eplavelta á Hagaleiti ..... 24
Nýggjur lýsingarfilmur ..... 25
35 ár í starvi hjá IRF ..... 26
25 ára starvsdagar ..... 26
Jóannes Guttesen nýggjur umhvørvisleiðari ..... 27
Grønlendsk kommuna leitaði sær íblástur hjá IRF ..... 27
Hagtøl 2023 ..... 28
Gongdin í mun til langtíðarmál felagsins ..... 30
Hvaðani kemur burturkastið? ..... 32
Endurvinning ..... 33
Útflutningur ..... 34
Jarn og Metal ..... 34
Pappír og papp ..... 35
Plast ..... 35
Elektronikkur ..... 35
Serburturkast ..... 36
Glas ..... 36
Matolja ..... 37
Spillolja og oljudálkað vatn ..... 38
Brenning ..... 38
Tyrving ..... 40
Rottangatøming ..... 41
Um hagtølini ..... 41
Niðurstøða ..... 41
Høvuðstøl ..... 43
Talvur ..... 44
Gongdin í rakstrinum ..... 47
Rakstrarúrslit samanborð við fíggjarætlan ..... 48
Leiðsluátekning ..... 49
Váttan frá óheftum grannskoðara ..... 50
Nýttur roknskaparháttur ..... 52
Rakstrarroknskapurin ..... 52
Fíggjarstøða ..... 53
Rakstrarroknskapur ..... 54
Fíggjarstøða ..... 55
Rakstrarroknskapur býttur á økir ..... 56
Notur til roknskapin ..... 57
Gjaldførisfrágreiðing ..... 66
Rakstrarroknskapur fyri oljureinsiverkið ..... 67
Rakstrarroknskapur fyri reinsitænastuna ..... 68
Rakstrarroknskapur fyri verkstaðið ..... 69
Rakstrarroknskapur fyri serhøllina ..... 70
Rakstrarroknskapur fyri endurvinningarskipanina ..... 71
Rakstrarroknskapur fyri Nýggjheiðar ..... 72




# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

### Felagsskapurin

L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF
Víkarvegur 107, 520 Leirvík
irf@irf.fo
www.irf.fo
Tlf: 41 42 43
V-tal: 353477
Heimstaðarkommuna: Eysturkommuna
Starvsfólk: 90 ársverk

### Nevnd

Gunvá við Keldu, Norðoyggjar, forkvinna
Oluf Müller, Norðstreymoy, næstformaður
Hans Anders Jacobsen, Eysturoy, nevndarlimur
Jóanis Albert Nielsen, Vágar, nevndarlimur
Alvi Mortensen, Suðuroy, nevndarlimur
Bjarki Henriksen, Sandoy, nevndarlimur

### Stjórn

Poul Andrias Joensen, stjóri

### Grannskoðan:

**P/f JANUAR**
Óðinshædd 13
Postsmoga 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 47 00
januar@januar.fo
www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2023 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ____________ 2024

___________________________________

Fundarstjóri

# IRF fyriskipan

**28 limakommunur**

**Aðalfundur**

**Nevnd**



**Gunvá við Keldu**
Norðoyggjar,
nevndarforkvinna



**Oluf Müller**
Norðstreymoy,
næstformaður



**Hans Anders Jacobsen**
Eysturoy,
nevndarlimur



**Jóanis Albert Nielsen**
Vágar,
nevndarlimur



**Alvi Mortensen**
Suðuroy,
nevndarlimur



**Bjarki Henriksen**
Sandoy,
nevndarlimur

**Leiðsla**



**Poul Andrias Joensen**
Stjóri



**Suffía Høj**
HR-leiðari



**Jóhannus Danielsen**
Fíggjarleiðari



**Andrias Joensen**
Tekniskur leiðari



**Jóannes Guttesen**
Umhvørvisleiðari

**Deildarleiðarar**



**Adelbert Ellingsgaard**
leiðari,
**Innsavning Reinsitænasta**



**Sverri Danielsen**
leiðari,
**Brennistøð Endurvinningarhøll**



**Hanus Á. Lervig**
leiðari,
**Oljureinsiverk Serhøll**



**Dánjal Debes**
formaður,
**Gjánoyri**



**Petur Højgaard**
leiðari,
**Verkstaður**



**Hans Andrias Didriksen**
leiðari,
**Reinsiverk og tyrvimóttøka Nýggjheiðar**



**Torfinnur Mortensen**
leiðari,
**Suðuroy**

# Limakommunur og fólkatal pr. 1. januar

| Limakommunur-økir | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 42 | 43 | 38 | 41 | 38 |
| Viðareiðis kommuna | 344 | 348 | 354 | 354 | 347 |
| Hvannasunds kommuna | 426 | 428 | 418 | 418 | 416 |
| Klaksvíkar kommuna | 5.478 | 5.427 | 5.398 | 5.338 | 5.250 |
| Kunoyar kommuna | 154 | 150 | 147 | 141 | 156 |
| **Tilsamans** | **6.444** | **6.396** | **6.355** | **6.292** | **6.207** |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.633 | 1.627 | 1.612 | 1.574 | 1.590 |
| Eysturkommuna | 2.296 | 2.267 | 2.256 | 2.211 | 2.156 |
| Nes kommuna | 1.536 | 1.502 | 1.450 | 1.399 | 1.338 |
| Runarvíkar kommuna | 4.379 | 4.347 | 4.270 | 4.215 | 4.165 |
| Sjóvar kommuna | 1.206 | 1.190 | 1.138 | 1.111 | 1.089 |
| Eiðis kommuna | 806 | 809 | 789 | 767 | 762 |
| **Tilsamans** | **11.856** | **11.742** | **11.515** | **11.277** | **11.100** |
| **Streymoy** | | | | | |
| Sunda kommuna | 1.828 | 1.834 | 1.821 | 1.811 | 1.811 |
| Kvívíkar kommuna | 599 | 605 | 601 | 624 | 597 |
| Vestmanna kommuna | 1.270 | 1.269 | 1.263 | 1.248 | 1.244 |
| **Tilsamans** | **3.697** | **3.708** | **3.685** | **3.683** | **3.652** |
| **Vágar** | | | | | |
| Vága kommuna | 2.198 | 2.184 | 2.163 | 2.140 | 2.130 |
| Sørvágs kommuna | 1.232 | 1.247 | 1.252 | 1.220 | 1.237 |
| **Tilsamans** | **3.430** | **3.431** | **3.415** | **3.360** | **3.367** |
| **Sandoy** | | | | | |
| Sands kommuna | 529 | 525 | 527 | 537 | 533 |
| Skopunar kommuna | 472 | 472 | 453 | 454 | 440 |
| Skálavíkar kommuna | 142 | 125 | 138 | 145 | 144 |
| Húsavíkar kommuna | 102 | 103 | 109 | 111 | 115 |
| Skúvoyar kommuna | 32 | 34 | 41 | 43 | 40 |
| **Tilsamans** | **1.277** | **1.259** | **1.268** | **1.290** | **1.272** |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Hvalbiar kommuna | 640 | 666 | 679 | 670 | 679 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.750 | 1.774 | 1.769 | 1.744 | 1.716 |
| Fámjins kommuna | 80 | 79 | 84 | 86 | 83 |
| Hovs kommuna | 106 | 104 | 102 | 97 | 99 |
| Porkeris kommuna | 322 | 332 | 317 | 319 | 318 |
| Vágs kommuna | 1.366 | 1.364 | 1.380 | 1.391 | 1.345 |
| Sumbiar kommuna | 335 | 343 | 357 | 350 | 358 |
| **Tilsamans** | **4.599** | **4.662** | **4.688** | **4.657** | **4.598** |
| **IRF TILSAMANS** | **31.303** | **31.198** | **30.926** | **30.559** | **30.196** |




# Leiðslufrágreiðing

## Inngangur

At vit støðugt gerast fleiri og fleiri fólk í Føroyum hevur sjálvsagt meira burturkast við sær. Hetta økir um krøvini til IRF, borgarar, vinnulív og politiska myndugleikan. Øll eiga at taka ábyrgd av øktu burturkastnøgdunum.

Í 2023 hevur IRF arbeitt nógv við at leggja virksemið á nýggju støðini í Nýggjheiðum til rættis. Umframt tann rakstrarliga partin eru eisini nógvar nýggjar mannagongdir, sum skulu setast í verk.

Eisini er nógv orka løgd í fyrireikingarnar til, at IRF, eftir áheitan frá Umhvørvismálaráðnum, verður pantumsitari í Føroyum, tá ið nýggja lógin um pant væntandi verður samtykt.

Í 2023 komu 40.298 tons av burturkasti inn til IRF. Hetta er 6,2 % meira enn í 2022, men um hugt verður eftir miðaltalinum fyri burturkastnøgdir seinastu 5 árini, er nøgdin í 2023 lægri enn miðal.

Seinastu tvey árini er kostnaðarstøðið hækkað munandi kring allan heimin, og inflatiónin hevur verið methøg. Inflatiónsvøksturin er ikki so stórur í løtuni, og útlit eru fyri, at rentan fer at lækka seinni í 2024. Hækkaða kostnaðarstøðið merkist væl hjá IRF, og tað sæst millum annað í lønar- og rentuhækkanum, umframt prísvøkstri á vørum og tænastum.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2023 er 45 tkr. í avlopi. Í rakstrarætlanini er roknað við 105 tkr. í avlopi. Sostatt er úrslitið á leið tað, sum roknað var við.

Inntøkurnar eru 1,1 mió. kr. størri enn mett, annar uttanhýsis kostnaður er 1,7 mió. kr. minni, og starvsfólkakostnaður er 161 tkr. størri enn mett frammanundan. Avskrivingarnar eru 2,1 mió. kr. størri enn mett, og rentuútreiðslurnar eru 0,7 mió. kr. minni.

Í 2023 gjørdi IRF íløgur fyri tilsamans 18,6 mió. kr. Til samanberingar kann nevnast, at í 2022 vórðu íløgur gjørdar fyri 59,3 mió. kr.

Roknskapirnir fyri oljureinsiverkið, reinsitænastuna, verkstaðið, serhøllina, endurvinningarskipanina og

Nýggjheiðar eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum í ársfrásøgnini.

Bruttoúrslitið fyri 2023 gjørdist 70,2 mió. kr., sum er 4,7 mió. kr. betri enn í 2022. Ársúrslitið gjørdist 45 tkr. í avlopi, sum er 132 tkr. verri enn í 2022.

Fíggjarstøðan javnvigar við 311 mió. kr. í 2023 í mun til 304 mió. kr. í 2022.

## Burturkastnøgdirnar

Í 2023 tók IRF ímóti 40.298 tonsum av burturkasti. Hetta er sum nevnt ein hækking samanborið við 2022. Nøgdirnar at brenna í 2023 lækkaðu við 344 tonsum, endurvinningarnøgdirnar hækkaðu við 1.471 tonsum, og nøgdirnar at tyrva hækkaðu við 1.236 tonsum.

Av teimum 40.298 tonsunum, sum IRF tók ímóti, vórðu 57,1 % brend, 33,5 % fóru til endurvinningar, og 9,4 % vórðu tyrvd.

Í mun til stóra vøksturin í tyrvinøgdunum er týdningarmikið at hava í huga, at við nýggju støðini í Nýggjheiðum tekur IRF nú ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum, eisini úr Tórshavnar kommunu. Tað gjørdi IRF ikki í 2022. Ein onnur orsøk til hækkaðu tyrvinøgdirnar er eitt økt virksemi við niðurbróting av bygningum, sum hevur havt nógv tyrviburturkast við sær.

## Útflutningurin

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar av landinum til endurvinningar. Samlaði útflutningurin í 2023 var 7.819 tons, sum er 8,9 % meiri enn í 2022, tá ið útflutningurin var 7.179 tons. Útflutningurin av endurvinningartilfari í 2023 liggur væl oman fyri miðaltalið fyri seinastu 5 árini.

Hóast meira varð sent av landinum til endurvinningar í 2023 enn í 2022, vóru sølurprísirnir í 2023 munandi verri, og tí gav endurvinningarskipanin eitt munandi minni avlop í fjør. Avlopið í 2023 var 0,5 mió. kr., meðan tað í 2022 var 2,8 mió. kr.

## Limakommunur og fólkatal

1. januar 2024 vóru vit 54.545 fólk í Føroyum, harav 31.303 búðu í teimum 28 limakommunum hjá IRF. Í limakommununum eru hetta 105 fólk fleiri enn við






ársbyrjan 2023. Hóast fólkavøksturin er minkaður, er framvegis fólkavøkstur í Føroyum, og IRF roknar við øktum fólkatali í langtíðarætlan felagsins.

## Limagjald

Á seinasta aðalfundi varð avgjørt, at limagjaldið fyri 2024 skuldi vera 1.355 kr. fyri hvønn borgara. Av hesum eru 1.147 kr. ruskgjald, og 208 kr. eru rottangagjald.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.

## Nýtt felags renovatiónsfelag í Føroyum

Á seinasta aðalfundi varð upplýst, at arbeitt varð við at stovna eitt nýtt renovatiónsfelag, sum allar kommunur í Føroyum kundu gerast limir í. Hetta arbeiðið bar ikki á mál, og tað verður ikki longur arbeitt við hesum málinum.

## IRF verður pantumsitari

Umhvørvismálaráðið hevur gjørt uppskot til løgtingslóg um nýggja pantskipan fyri fløskur og dósir, sum er lagt fyri løgtingið í vár. Heitt er á IRF um at vera pantumsitari. Í 2023 hevur IRF arbeitt nógv við at fyrireika seg til at vera pantumsitari, og væntandi verður avtala millum IRF og Umhvørvismálaráðið gjørd í 2024.

## Stjóraskifti hjá IRF

Í sambandi við, at Poul Andrias Joensen leggur frá sum stjóri hjá IRF, varð lýst eftir nýggjum stjóra. 24 umsóknir komu inn. Sigurd Lamhauge er settur at byrja í starvinum 1. juni 2024.

## Rakstrarváðar

Seinnu árini hevur verið fólkavøkstur og viðgongd í búskapinum í Føroyum. Hetta hevur havt hækkandi inntøkur við sær hjá IRF. Seinastu tvey árini hevur inflatiónin verið høg, og tí eru útreiðslurnar hjá IRF nógv øktar. Inflatiónsvøksturin er ikki so stórur í løtuni, men um tað kemur afturgongd í føroyska búskapin, kann væntast, at inntøkan minkar.

IRF fylgir væl við búskapargongdini, so tað eisini í framtíðini er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá felagnum.

IRF hevur ikki týðandi upphæddir útistandandi hjá einstøkum skuldara. Skuldarar felagsins halda sum heild væl sínar skyldur, men um afturgongd verður í búskapinum, kann tað hava við sær, at gjaldsevnini hjá skuldarunum versna. Tað kann hava ávirkan á gjaldførið hjá felagnum. IRF fylgir væl við gongdini í útistandandi og hevur greiðar mannagongdir á skuldaraøkinum. Renturnar á lánunum hjá felagnum eru bæði fastar og broytiligar. Vandi er við broytiligum rentum, og felagið fylgir væl við gongdini á rentuni.

## Samfelagsábyrgd og menning

Samfelagsábyrgd er partur av øllum virkisætlanum hjá IRF. IRF lagar seg áhaldandi til dagførd og herd krøv á umhvørvisøkinum. Í Føroyum er nýggj burturkastkunngerð á veg, og IRF fylgir við dagføringum á lógarøkinum í okkara grannalondum og ES. IRF hevur góðar førleikar á burturkast- og umhvørvisøkinum og vil ganga undan at menna starvsfólk felagsins, so tey eru útbúgvin og tilvitað um hesa samfelagsábyrgd, sum IRF átekur sær.

Broytt lógar- og samfelagskrøv, menning, tillagingar og broytingar á burturkast- og umhvørvisøkinum kunnu hava útreiðslur við sær, sum dýrka um rakstur felagsins.



## Íløgur

Í 2023 hevur IRF gjørt íløgur fyri 18,6 mió. kr., og hetta eru 3,1 mió. kr. meira enn mett frammanundan. Orsøkin til henda munin er, at íløgan í Nýggjheiðum hevur forskotið seg nakað millum árini 2022 og 2023.

## Tyrvimóttøka og reinsiverk í Nýggjheiðum

Nýggja tyrvimóttøkan og reinsiverkið í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík varð avhendað fyrst í 2023. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina pr. 31. des. 2023 er uppgjørdur til 129,4 mió. kr. Av hesum vórðu 9,4 mió. kr. brúktar í 2023, og harafturat er íløga gjørd í 2023 til rakstrargøgn, trukk og bil til støðina fyri 0,8 mió. kr.

IRF tók í 2019 eitt lán til verkætlanina upp á 120 mió. kr., og hetta lánið varð í 2022 hækkað til 130 mió. kr.

## Verkstaðið í Klaksvík

Í nógv ár leigaði IRF eitt verkstað í Klaksvík til umvælingar og viðlíkahald av IRF-bilum og bingjum. Í 2022 keypti IRF verkstaðið, og í 2023 er verkstaðið útbygt og útiøkið dagført. Samlaði kostnaðurin pr. 31. des. 2023 er 10,6 mió. kr., og av hesum vórðu 4,2 mió. kr. brúktar í 2023. Samlaða íløgan varð í 2021 mett til 10,5 mió. kr.

Ætlanin er eisini at fara undir at dagføra sjálvt verkstaðið, men enn er støða ikki tikin til, nær tað verður.

## Akfør

Stórur partur av virkseminum hjá IRF er innsavning og flutningur av burturkasti. IRF hevur gjøgnum árini gjørt íløgur í nógv ymisk akfør, sum dagliga hava nógv virksemi og koyra nógv. Akførini krevja sjálvandi nógv viðlíkahald, og tørvur er eisini regluliga á at endurnýggja og keypa fleiri akfør.

Í 2022 bílegði IRF tríggjar bilar til flutning av stórum bingjum. Nýggju bilarnir koma eftir ætlan at avloysa tríggjar eldri bilar. Orsakað av langari leveringartíð er bert tann eini bilurin komin til Føroya í 2023. Kostnaður fyri henda bilin er 1,9 mió. kr. Hinir báðir bilarnir koma til Føroya í 2024.

## Aðrar íløgur

Umframt frammanfyri standandi hevur IRF í 2023 gjørt íløgur í onnur tyrvingar- og umlastingarpláss, KT, vektskipan, rakstrargøgn og endurvinningarskipan fyri í alt 3,1 mió. kr.

## Komandi íløgur

IRF hevur í fleiri ár fyrireikað arbeiðið at byggja nýggja umlastingarstøð í Trøllavík, men vegna stóra inflatiónsvøksturin, sum hevur ávirkað raksturin hjá IRF nógv, hevur tað ikki verið møguligt at farið í gongd við bygginingina. Arbeitt verður framvegis við verkætlanini, sum vónandi kann fara í gongd komandi árið.

### Alt virksemið hjá IRF ISO-góðkent

IRF hevur í 2023 havt ISO-skoðan í Nýggjheiðum, og nú eru allar deildir hjá IRF góðkendar sambært umhvørvisskipanini ISO-14001 fram til juli 2025.

Umframt at allar støðirnar hjá IRF eru ISO-góðkendar, hevur IRF ISO-góðkenning fyri at hava sett heimsmálini hjá ST í verk í umhvørvispolitikki felagsins.

Við ISO-góðkenningunum átekur IRF sær at arbeiða við munadyggum loysnum innan fyribyrging, innsavning og hagreiðing av burturkasti frá borgarum og virkjum. Umhvørvispolitikkurin hjá IRF, sum tekur støði í seks av teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning, útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

### Endi

Tilverugrundarlagið hjá IRF hevur frá fyrstan tíð verið at innsavna og hagreiða burturkast á umhvørvisliga besta hátt. Seinastu árini hevur tó alsamt størri dentur verið lagdur á at breiða út hugsjónina handan burturkasttrappuna, um at vit øll mugu hugsa meira um fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning av burturkasti og minni um brenning og tyrving av burturkasti.

Øll vitjandi hjá IRF fáa frágreiðing um hesa hugsjónina. Tey læra at síggja tað virðismikla tilfeingið, sum er í burturkastinum, og tey síggja týdningin av, at burturkastið verður rætt skilt. Seinastu árini hevur talið av børnum og ungum, sum árliga vitja IRF, verið hækkandi, og í fjør vóru eisini fleiri fyritøkur og stovnar á vitjan. Hetta er eitt úrslit av, at IRF nú leggur størri orku í at ráðgeva vinnukundum um burturkast við tí endamáli at gerast betri til bæði at minka um og at skilja vinnuburturkast.

Burturkastøkið í Føroyum er í rúkandi menning, men stórar avbjóðingar eru fyri framman, og 2024 verður væntandi eitt sera spennandi ár. Í løtuni verður bíðað eftir lóg og kunngerð um nýggja pantskipan og eftir nýggjari burturkastkunngerð. Hesi lógarverk koma at fáa sera stóra ávirkan á alt virksemið hjá IRF. Eitt nú fara hesi lógarverkini at vera avgerandi fyri, hvussu íløgur verða raðfestar komandi árini.

Um hugt verður eftir nýggjastu hagtølunum hjá IRF, flyta vit okkum eftir øllum at døma rætta vegin í mun til langtíðarmálini, men spurningurin er, um tað gongur nóg skjótt? Eru vit í Føroyum klár at taka tey stóru tøkini fyri umhvørvið? Hetta eru tøk, sum skulu takast í privatu heimunum, á arbeiðsplássunum kring landið, eins og í kommunal- og landspolitiska geiranum.

IRF er til reiðar at taka hesi tøkini saman við tykkum – umhvørvinum og okkum øllum at frama.



# HAGTØL 2023



Alt burturkast, sum IRF tekur ímóti, verður viðgjørt eftir trimum høvuðsháttum: Endurvinning, brenning og tyrving. Endurvinningarburturkast er burturkast, ið kann endurvinnast til nýggjar vørur, t.d. papp ella jarn. Burturkast, ið ikki kann endurvinnast, t.d. blandað húsarhaldsrusk, verður brent, og ein partur av hitanum frá brenningini verður orkuútvunnin og nýttur til fjarhita. Burturkast, ið hvørki kann endurvinnast ella brennast, t.d. gips, verður tyrvt. IRF arbeiðir fyri, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurvunnið, í aðru atløgu brent, og um tað ikki ber til, so verður burturkastið tyrvt. Samstundis kunnar IRF borgarar og viðskiftafólk um fyribyrging og endurnýtslu av burturkasti.

IRF hevur sett sær sum langtíðarmál, at í 2030 skal í minsta lagi 50 % av øllum burturkasti, sum IRF tekur ímóti, endurvinnast. Í mesta lagi 47 % skal brennast, og í mesta lagi 3 % tyrvast.

Í 2023 tók IRF ímóti 40.298 tonsum av burturkasti. 13.497 tons vórðu endurvunnin, 23.015 tons vórðu brend, og 3.786 tons vórðu tyrvd (talva 1). Nøgdirnar tilsamans eru øktar seinasta árið, men liggja tó framvegis undir miðal fyri seinastu fimm árini.

Í mun til miðalnøgdirnar seinastu fimm árini liggja nøgdirnar til endurvinningar yvir miðal, meðan nøgdirnar at brenna og at tyrva liggja undir miðal.

**Talva 1** – Burturkastnøgdir árini 2019–2023. Fyri at kunna samanbera hagtøl eru summi tøl umroknað frá $m^3$ til tons. Ein partur av nøgdunum til endurvinningar er skrásettur ísv. útflutning og ikki móttøku.

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurvinning | 12.209 | 11.687 | 13.849 | 12.026 | 13.497 | 12.654 |
| Brenning | 24.589 | 24.728 | 25.012 | 23.359 | 23.015 | 24.141 |
| Tyrving | 5.198 | 4.316 | 3.191 | 2.550 | 3.786 | 3.808 |
| **Tilsamans** | **41.996** | **40.731** | **42.053** | **37.934** | **40.298** | **40.602** |

**Ritmynd 1** – Býtið millum bólkar 2023




**Ritmynd 2**
Lutfalsliga býtið í % millum endurvinning, brenning og tyrving seinastu fimm árini.



## Gongdin í mun til langtíðarmál felagsins

Sum omanfyri nevnt, hevur IRF í tráð við umhvørvispolitikk felagsins sett sær nøkur langtíðarmál viðvíkjandi lutfalsliga býtinum í % millum endurvinning, brenning og tyrving. Samanumtikið gongur spakuliga rætta vegin.

### Endurvinning

Lutfalsliga nøgdin av burturkasti til endurvinningar økist spakuliga rætta vegin (ritmynd 3). Málið fyri 2030 er, at í minsta lagi 50 % av burturkastinum skal endurvinnast. Seinastu fimm árini hevur luturin av burturkasti til endurvinningar flutt seg frá 29,1 % til 33,5 %, og tað er minni enn 1 % um árið. Um málið fyri 2030 skal røkkast, skulu munagóð átøk gerast næstu seks árini.

### Brenning

Lutfalsliga nøgdin til brenningar liggur væl niðan fyri miðal í 2023 í mun til seinastu fimm árini (ritmynd 3). Málið fyri 2030 er, at í mesta lagi 47 % av burturkastinum skal brennast. Í miðal hevur nøgdin til brenningar ligið á umleið 60 %. Miðalnøgdin seinastu fimm árini er lutfalsliga støðug, men um gongdin seinasta árið heldur fram, so er møguleiki at røkka málinum í 2030.

### Tyrving

Lutfalsliga nøgdin av burturkasti at tyrva er økt nakað seinasta árið og liggur á miðalvirðinum fyri seinastu fimm árini (ritmynd 3). Í mun til vøksturin í tyrvinøgdunum er týdningarmikið at hava í huga, at við nýggju støðini í Nýggjheiðum tekur IRF nú ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum, eisini úr Tórshavnar kommunu. Tað gjørdi IRF ikki í 2022. Ein onnur orsøk til hækkaðu tyrvinøgdirnar er økt virksemi frá byggivinnuni, ið hevur havt við sær størri nøgdir av tyrviburturkasti enn vanligt. Frameftir verður alt tyrviburturkast í Føroyum tyrvt í Nýggjheiðum.



**Ritmynd 3**
Gongdin í lutfalsliga býtinum í % millum endurvinning, brenning og tyrving.









## Hvaðani kemur burturkastið?

IRF tekur ímóti burturkasti frá húsarhaldum, kommunalum endurvinningarplássum (bingjuplássum), vinnulívi og Tórshavnar kommunu. Seinasta árið er fólkatalið í limakommununum hjá IRF hækkað við 105 fólkum, og talið av húskjum er hækkað við 80. Talið av endurvinningarplássum stendur í stað við 41 plássum í IRF-økinum (talva 2).

Í 2023 vendu tilsamans 572 ymiskir vinnukundar sær til IRF við burturkasti. Vinnukundar umboða vinnuna í breiðari merking – alivinnuna, fiskivinnuna, byggivinnuna, landbúnaðarvinnuna, flutnings- og tænastuvinnuna, og almennar og kommunalar stovnar. Harafturat kann nevnast, at spillolja, oljudálkað vatn, pappír og papp kemur úr øllum landinum til IRF. Frameftir verður eisini tyrviburturkast úr øllum landinum tyrvt í Nýggjheiðum. Nakað av tyrviburturkasti er móttikið frá Tórshavnar kommunu í 2023, og tað sama er galdandi fyri ilskuna frá brennistøðini á Hjalla, sum nú verður móttikin í Nýggjheiðum og tyrvd saman við ilskuni frá brennistøðini á Hagaleiti. Somuleiðis fer rottangaevja úr øllum landinum nú til nýggja reinsiverkið í Nýggjheiðum og verður síðani tyrvd á staðnum.

**Talva 2 –** Fólkatalið í í IRF-økinum, húskir í IRF-økinum, kommunal endurvinningarpláss í IRF-økinum og vinnukundar úr øllum Føroyum. Talvan vísir tøl pr. 1 januar í hvørjum ári.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólkatal** | 30.196 | 30.559 | 30.926 | 31.198 | 31.303 | 30.836 |
| **Húski** | 10.798 | 10.906 | 11.008 | 11.108 | 11.188 | 11.002 |
| **Kommunal Endurvinningarpláss** | 41 | 41 | 41 | 41 | 41 | 41 |
| **Vinnukundar** | 540 | 550 | 541 | 538 | 572 | 548 |

Í teimum 28 limakommununum hjá IRF eru tilsamans 41 kommunal endurvinningarpláss. Tað eru limakommunurnar, sum eiga og reka tey kommunalu plássini. 21 kommunur hava eitt endurvinningarpláss, fimm kommunur hava tvey pláss og tvær kommunur hava fimm pláss. Endurvinningarplássini eru sera ymisk í stødd. Tey stóru plássini eru umleið 1.000–3.000 $m^2$ til støddar, meðan tey smáu plássini eru á leið 50–100 $m^2$.

Tað er sera ymiskt, hvørjar møguleikar, tey einstøku endurvinningarplássini bjóða at skilja burturkast. Kommunalu endurvinningarplássini eru týdningarmikil liður í arbeiðinum at røkka málinum um 50 % endurvinning í 2030. Tí er tað týdningarmikið, at menningin av plássunum verður raðfest hægri og betur skipað komandi árini.

**Talva 3** – Móttikið burturkast á kommunalu plássunum kring landið 2020–2023

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|
| Móttikið á endurvinningarplássum, tons | 11.833 | 9.362 | 8.605 | 8.731 | 9.633 |
| Burturkast pr. borgara, kg | 388 | 304 | 277 | 279 | 312 |

Tey 41 endurvinningarplássini lótu tilsamans 8.731 tons av burturkasti til IRF í 2023 (talva 3). Tað svarar til, at hvør borgari í limakommununum hjá IRF læt plássunum umleið 279 kg av burturkasti í 2023.

Á kortinum niðanfyri (mynd 1) sæst staðsetingin av teimum 41 kommunalu endurvinningarplássunum hjá limakommununum hjá IRF.




## Endurvinning

Talva 4 vísir samlaðu nøgdirnar av tí, sum IRF savnaði inn til endurvinningar í 2023. Hvør bólkur sær er útgreinaður í talvunum 6–13.

Um IRF skal røkka málinum at endurvinna í minsta lagi 50 % av øllum burturkastinum í 2030, skulu munagóð átøk gerast á endurvinningarøkinum. Bæði borgarar, kommunur og vinna skulu gerast betri til at skilja endurvinningartilfar frá burturkastinum, sum skal brennast ella tyrvast. IRF skal áhaldandi arbeiða við at økja um nøgdirnar av burturkasti til endurvinningar og víðka um tilboðið av burturkastbólkum, sum kunnu latast til endurvinningar. Í flestu førum krevja slík átøk økta fígging, tí flutningsútreiðslurnar økjast, og somuleiðis økjast útreiðslurnar til høli, útgerð og starvsfólk.

**Talva 4** – Burturkastnøgdir til endurvinningar 2019-2023 (tons)

| Endurvinning | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Jarn og metal | 2.902 | 2.204 | 4.059 | 2.644 | 3.095 | 2.981 |
| Papp og pappír | 1.992 | 2.464 | 2.658 | 2.597 | 2.586 | 2.459 |
| Plast | 844 | 867 | 1.194 | 1.262 | 1.583 | 1.150 |
| Elektronikkur og káplar | 157 | 157 | 123 | 104 | 99 | 128 |
| Serburturkast | 115 | 134 | 125 | 128 | 105 | 121 |
| Glas | 0 | 0 | 11 | 27 | 36 | 15 |
| Spillolja | 2.023 | 1.805 | 1.897 | 1.276 | 1.589 | 1.718 |
| Reinsað vatn latið á sjógv | 4.172 | 4.056 | 3.781 | 3.988 | 4.360 | 4.071 |
| Matolja | 5 | 10 | 10 | 32 | 44 | 20 |
| **Tilsamans, tons** | **12.204** | **11.686** | **13.849** | **12.026** | **13.452** | **12.644** |

## Útflutningur

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar til viðgerðar uttanlands. Meginparturin fer til endurvinningar, men partar av ávísum serliga dálkandi burturkastbólkum verða brendir ella tyrvdir uttanlands. Av øllum burturkastinum, sum IRF sendir av landinum til endurvinningar, er ofta ein lítil partur, sum – orsakað av dálking ella skeivari skiljing – ikki verður endurvunnin, men í staðin brendur ella tyrvdur (talva 5).

Hjá IRF merkja vit stóran áhuga frá bæði borgarum, fyritøkum og ikki minst næmingum, sum vilja vita, hvar burturkastið endar, og hvussu IRF kann tryggja, at burturkastið verður viðgjørt á umhvørvisliga bestan hátt. IRF arbeiðir miðvíst við at fylgja útflutta burturkastinum og at fáa so væl útgreinað hagtøl sum gjørligt. Hetta verður gjørt fyri at kunna skjalprógva veruliga endurvinningarpartin og á tann hátt støðugt arbeiða við at menna henda partin.

**Talva 5** – Burturkastnøgdir til endurvinningar/viðgerðar uttanlands 2020–2023 (tons)

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|
| Endurvinning | 5.825 | 8.171 | 6.762 | 7.503 | 7.065 |
| Brenning | 193 | 118 | 396 | 260 | 242 |
| Tyrving | 11 | 17 | 21 | 56 | 26 |
| **Tilsamans** | **6.029** | **8.306** | **7.179** | **7.819** | **7.333** |

## Jarn og metal

Í 2023 útflutti IRF 3.095 tons av jarni og metalum til endurvinningar (talva 6). Hesin burturkastbólkur kann endurvinnast fleiri ferðir. Eins og undanfarin ár er bróðurparturin av endurvinningarburturkastinum jarn og metal. Í 2023 vórðu 2.425 tons av jarni útflutt, sum er eitt vet oman fyri miðaltalið fyri seinastu fimm árini.

Í 2023 tók IRF ímóti bilvrakum, ið svara til 607 tons. Øll bilvrak, sum IRF tekur ímóti, verða send til Kommunalu brennistøðina á Hjalla til umhvørvisviðgerð, áðrenn tey verða send av landinum til endurvinningar.

Í 2023 útflutti IRF 34 tons av øðrum metalum enn jarn, t.d. kopar, aluminium, blýggj og rustfrítt stál. Søluprísurin fyri hesi metal er hægri enn prísurin fyri jarn, og tí loysir tað seg bæði umhvørvisliga og fíggjarliga at virðisøkja hesi metalini.

Í 2023 útflutti IRF 29 tons av aluminiumsdósum frá pantskipanini til endurvinningar. Tað svarar nøkulunda til miðaltalið seinastu fimm árini.

**Talva 6** – Jarn og metal til endurvinningar 2019-2023 (tons). Miðalvektin á bilvrakum í hagtølunum er ásett at vera 1,2 tons.

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Jarn | 2.131 | 1.436 | 3.403 | 1.993 | 2.425 | 2.278 |
| Bilvrak | 684 | 710 | 641 | 598 | 607 | 648 |
| Annað metal | 58 | 60 | 58 | 62 | 34 | 54 |
| Aluminiumsdósir | 29 | 27 | 26 | 31 | 29 | 28 |
| **Tilsamans** | **2.902** | **2.233** | **4.128** | **2.684** | **3.095** | **3.008** |

## Pappír og papp

Endurvinningarhøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Her skal viðmerkjast, at nøgdirnar av pappi og pappíri úr Tórshavnar kommunu eisini eru roknaðar við í hagtølini hjá IRF. Í 2023 var samlaði útflutningurin 2.605 tons. Tað er nakað oman fyri miðalvirðið seinastu fimm árini (talva 7).

**Talva 7** – Nøgdir av pappi og pappíri til endurvinningar 2019–2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Pappír | 484 | 529 | 585 | 548 | 333 | 496 |
| Papp | 1.507 | 1.935 | 2.072 | 2.049 | 2.272 | 1.967 |
| **Tilsamans** | **1.992** | **2.464** | **2.658** | **2.597** | **2.605** | **2.463** |

## Plast

IRF er ment nógv seinastu árini, tá ið tað snýr seg um plastendurvinning, og eingin ivi er um, at IRF gongur á odda á hesum økinum í Føroyum.

Í 2023 útflutti IRF 1.620 tons av plasti til endurvinningar (talva 8). Hetta er væl oman fyri miðaltalið seinastu fimm árini. Flestu plastbólkarnir eru í vøkstri í mun til miðalvirðini fyri seinastu árini, undantikið aliringar og fóðurslangur. IRF fer framhaldandi at virka fyri, at góða gongdin við endurvinning av plasti heldur fram.

**Talva 8** – Plast til endurvinningar 2019-2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Trol, trossar og net | 245 | 278 | 257 | 229 | 348 | 278 |
| Stórsekkir (PP) | 270 | 277 | 392 | 381 | 424 | 368 |
| Aliringar og fóðurslangur (HDPE) | 166 | 140 | 133 | 216 | 104 | 148 |
| Pantfløskur (PET) | 96 | 94 | 97 | 112 | 131 | 108 |
| Bleytt vøruplast (LDPE) | 58 | 73 | 87 | 113 | 107 | 95 |
| Annað hart plast | 8 | 5 | 18 | 0 | 0 | 6 |
| Graslíkisvøllir | - | 0 | 211 | 211 | 506 | 232 |
| **Tilsamans** | **844** | **867** | **1.194** | **1.262** | **1.620** | **1.236** |

## Elektronikkur

Í 2023 útflutti IRF 148 tons av elektronikki og káplum til endurvinningar. Av hesum vóru 111 tons elektronikkur og 37 tons káplar (talva 9). Nøgdin liggur nakað niðan fyri miðalvirðið fyri seinastu árini. Tað er sera týdningarmikið, at elektronikkur og káplar, sum innihalda nógv metal, verða skild frá til endurvinningar. Talan er um virðismikið tilfeingi, sum kann endurvinnast fleiri ferðir.

**Talva 9** – Mongdir av elektronikki og káplum til endurvinningar 2019-2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Elektronikkur | 118 | 138 | 110 | 110 | 111 | 118 |
| Káplar | 39 | 53 | 40 | 22 | 37 | 38 |
| **Tilsamans** | **157** | **191** | **151** | **132** | **148** | **156** |




## Serburturkast

Serburturkast er burturkast, sum inniheldur serliga dálkandi evni. Fleiri av hesum burturkastbólkunum eru vandamiklir at handfara, skaðiligir fyri fólk og fæ, og sera dálkandi, um teir enda í náttúruni. Nakað av serburturkasti verður brent á góðkendum brennistøðum í útlondum, og aðrir bólkar verða partvíst endurvunnir. Til dømis verða 65 % av spreydósunum, sum IRF sendir av landinum, endurvunnar, 62 % av battaríunum og 81 % av ljósperunum.

Samanlagt sendi IRF 230 tons av burturkasti til serviðgerðar í 2023. Flestu bólkarnir av serburturkasti halda seg nøkulunda á miðalvirðinum fyri seinastu fimm árini (talva 10).

**Talva 10** – Mongdir av serburturkasti 2019-2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Evja frá nótavaski | 46 | 50 | 0 | 264 | 99 | 92 |
| Køli- og frystiskáp | 61 | 71 | 73 | 73 | 58 | 67 |
| Akkumulatorar | 42 | 64 | 48 | 48 | 57 | 52 |
| Trýstfløskur | 3 | 4 | 4 | 9 | 2 | 4 |
| Battaríir | 7 | 8 | 10 | 8 | 4 | 7 |
| Kemikaliuburturkast | 14 | 3 | 4 | 4 | 7 | 6 |
| Ljósperur | 2 | 3 | 3 | 3 | 2 | 2 |
| Spreydósir | - | 2 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| Fýrverk | 0 | 1 | 1 | 0,3 | 0,4 | 0,5 |
| **Tilsamans** | **175** | **205** | **145** | **412** | **230** | **233** |




## Glas

Sum talva 11 vísir, er nøgdin av glasi til endurvinningar støðugt vaksandi. Glasið er ein burturkastbólkur, sum er ókeypis hjá kommununum at sleppa av við. Knapt helvtin av teimum 41 endurvinningarplássunum hava tilboð til borgaran at sleppa av við glas. Sostatt eru møguleikar fyri betringum á hesum økinum.

Umhvørvisliga loysir tað seg sera væl at endurvinna glas, tí at framleiða vørur úr endurvunnum glasi er ikki eins orkukrevjandi sum at framleiða glas úr nýggjum rávørum. IRF fer í næstum at kanna, um møguleikar eru fyri at endurnýta glas í Føroyum. Somuleiðis er IRF í ferð við at gera útrokningar í $CO^{2}$-útláti, sum fara at vísa, hvørt tað er best at útflyta glasið ella at endurnýta tað her í Føroyum. Umhvørvisliga kann tað vísa seg, at tað er best ikki at flyta tilfeingið langa teinin til endurvinningar.

**Talva 11** – Nøgdir av glasi til endurvinningar 2021-2023 (tons). Glas varð fyri fyrstu ferð útflutt í 2021.

| | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| Glas | 11 | 27 | 36 | 25 |



## Matolja

Seinastu árini hevur IRF útflutt matolju til endurvinningar. Frá 2023 verður matoljan ikki longur útflutt, men í staðin latin oljureinsiverkinum hjá IRF. Matoljan fer frameftir at verða gagnnýtt í Føroyum, eins og tann reinsaða spilloljan. Hetta er umhvørvisliga og fíggjarliga ein góð loysn, tí einhvør flutningur uttanlands hevur $CO^2$-útlát við sær, umframt at flutningurin er kostnaðarmikil. Nøgdirnar av matolju til endurvinningar eru støðugt vaksandi (talva 12).

**Talva 12** – Nøgdir av matolju til endurvinningar 2019-2023 (tons). Matolja varð fyrstu ferð útflutt í 2019.

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Matolja | 5 | 10 | 10 | 32 | 44 | 20 |






## Spillolja og oljudálkað vatn

Oljureinsiverkið hjá IRF tók ímóti 6.066 tonsum av spillolju og oljudálkaðum vatni í 2023. Av hesum framleiddi verkið 1.589 tons av reinsaðari olju og 4.360 tons av reinum vatni. 117 tons av evju vórðu reinsað frá (talva 13). Oljuframleiðslan liggur nakað niðan fyri miðal seinastu fimm árini, og vatnframleiðslan liggur nakað oman fyri miðal. Reinsaða oljan verður seld, reinsaða vatnið rennur á sjógv, og fráreinsaða evjan verður brend á brennistøðini.

**Talva 13** – Hagtøl fyri oljureinsiverkið 2019-2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Spilloljusøla | 2.023 | 1.805 | 1.897 | 1.276 | 1.589 | 1.718 |
| Reinsað vatn latið á sjógv | 4.172 | 4.056 | 3.781 | 3.988 | 4.360 | 4.071 |
| Evja frá oljureinsiverkinum | 214 | 253 | 185 | 214 | 117 | 197 |
| **Móttikið á oljureinsiverkinum** | **6.409** | **6.114** | **5.864** | **5.478** | **6.066** | **5.986** |




## Brenning

Í 2023 tók IRF ímóti 22.755 tonsum av burturkasti til brenningar (talva 14). Av hesum vórðu 22.747 tons brend á Hagaleiti, og 8 tons vórðu brend á Kommunalu brennistøðini á Hjalla. Harumframt vórðu 260 tons brend uttanlands, sí talvu 5. Tonsatalið í 2023 er væl lægri enn miðaltalið seinastu fimm árini. Ein orsøk er, at eingin goymsla av burturkasti hevur verið hjá IRF síðan 2021. Aðrar orsøkir kunnu vera, at sjóneykan seinastu árini er sett á matoyðsl, betri skiljing og meira endurvinning av burturkasti.

**Talva 14** – Burturkast til brenningar 2019 – 2023 (tons)

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Brent hjá IRF á Hagaleiti | 26.843 | 25.945 | 24.891 | 22.917 | 22.747 | 24.669 |
| Brent hjá KB á Hjalla | 445 | 134 | 71 | 64 | 8 | 145 |
| **Burturkast at brenna í alt** | **27.288** | **26.079** | **24.963** | **22.981** | **22.755** | **24.813** |

Brennistøðin á Hagaleiti var í rakstri 8.015 tímar í 2023. Tað svarar til 334 dagar ella 91,5 % av tíðini í 2023. Ovnurin brendi í miðal 2,8 tons um tíman, og tað svarar til 68 tons um samdøgrið (talva 15).

**Talva 15** – Rakstrarhagtøl fyri brennistøðina 2019-2023

| | | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brennitímar | Tímar | 8.478 | 8.347 | 8.096 | 7.888 | 8.015 | 8.165 |
| Brennitímar | % | 96,8 | 95,3 | 92,4 | 90,0 | 91,5 | 93,2 |
| Brent hjá IRF | Tons/tíma | 3,2 | 3,1 | 3,1 | 2,9 | 2,8 | 3,0 |
| Brent hjá IRF | Tons/samdøgur | 76 | 75 | 74 | 70 | 68 | 72 |

Orkuframleiðslan hjá brennistøðini var 65.295 MWh í 2023, og av hesum vóru 18.830 MWh veitt sum fjarhiti til FMP og til IRF á Hagaleiti (talva 16). Tað svarar til, at veitingin av fjarhita í 2023 er hægri enn miðalvirðið seinastu fimm árini.

**Talva 16** – Orkuframleiðsla og fjarhitaveiting 2019-2023

| | | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orkuframleiðsla | MWh | 69.513 | 73.596 | 70.352 | 66.578 | 65.295 | 69.067 |
| Veittur fjarhiti | MWh | 18.737 | 16.389 | 14.765 | 20.545 | 18.830 | 17.853 |
| Veittur fjarhiti | % | 27,0 | 22,3 | 21,0 | 30,9 | 28,8 | 26,0 |

Í 2023 vórðu samanlagt 2.754 tons av ilsku frá brennistøðini tyrvd á tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum. Hetta svarar til 121 kg av ilsku fyri hvørt tons av brendum burturkasti (talva 17). Tess verri burturkastið er skilt, tess meira jarn, glas og annað er í burturkastinum at brenna – og tess størri nøgdir av ilsku fáa vit.

IRF hevur eina roykreinsiskipan við filtri, ið brúkar kálk og aktivt kol at reinsa roykin. Tað, sum verður reinsað úr roykinum, er flogøska – ella roykreinsiburturkast. Flogøskan, sum er dálkað við m.ø. tungmetalum, verður útflutt og tyrvd á Langøya í Noregi. Flogøskan verður viðgjørd, áðrenn hon verður tyrvd, og virksemið á Langøya er umhvørvisgóðkent. Frá roykreinsiskipanini komu 510 tons av flogøsku í 2023, sum svarar til 22 kg av flogøsku fyri hvørt tons av burturkasti, sum varð brent á Hagaleiti í 2023.

**Talva 17** – Nøgdir av ilsku og flogøsku 2019-2023

| | | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ilska | tons | 4.286 | 3.563 | 3.402 | 3.212 | 2.754 | 3.443 |
| Ilska pr. brent burturkast | kg/tons | 160 | 137 | 137 | 140 | 121 | 139 |
| Flogøska | tons | 544 | 469 | 485 | 422 | 510 | 486 |
| Flogøska pr. brent burturkast | kg/tons | 20 | 18 | 19 | 18 | 22 | 20 |

Rakstrarhagtøl fyri brennistøðina hjá IRF í 2023







## Tyrving

Í 2023 tók IRF ímóti 3.730 tonsum av burturkasti at tyrva (talva 18). Hetta fevnir m.a. um asbest, PVC-plast, glas- og steinull, gips og keramikk umframt annað blandað tilfar at tyrva. Íroknað ilsku og viðgjørda rottangaevju frá IRF og KB vórðu í alt 8.269 tons tyrvd í 2023. Ein vøkstur er í mun til 2022, har nøgdin av burturkasti at tyrva var serliga lítil.

Fleiri orsøkir kunnu vera til øktu tyrvinøgdirnar. Fyrst og fremst er tað týdningarmikið at hava í huga, at við nýggju støðini í Nýggjheiðum tekur IRF nú ímóti tyrviburturkasti úr øllum Føroyum, eisini úr Tórshavnar kommunu. Tað gjørdi IRF ikki í 2022. Ein onnur orsøk er eitt økt virksemi við niðurbróting av bygningum, sum hava havt nógv tyrviburturkast við sær. Harumframt kann ein triðja orsøk vera, at alsamt meira tyrviburturkast nú verður rætt burturbeint. Áður er kanska ein partur av tyrviburturkastinum endaður á brennistøðini ella aðrastaðni.

**Talva 18** – Nøgdir av tyrviburturkasti (tons) 2019-2023

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tyrviburturkast | 5.198 | 4.305 | 3.174 | 2.530 | 3.730 | 3.787 |
| Ilska IRF | 4.286 | 3.563 | 3.402 | 3.212 | 2.754 | 3.443 |
| Ilska KB | - | 381 | 2.036 | 1.742 | 762 | 984 |
| Viðgjørd rottangaevja | - | - | - | - | 1.024 | 1.024 |
| **Samanlagt** | **9.484** | **8.249** | **8.612** | **7.484** | **8.269** | **8.420** |

Í 2023 tyrvdi IRF 3.730 tons av tyrviburturkasti, 3.516 tons av ilsku og 1.024 tons av viðgjørdari rottangaevju. Tilsamans 8.269 tons



## Rottangatøming

Í 2023 vórðu samanlagt 11.716 rottangar tømdir í IRF-økinum (talva 19). Í IRF-økinum eru tilsamans 13.378 tangar skrásettir í 2023. Evjan frá rottangunum hevur verið løgd í evjubrunnar øll árini, men frá 2023 verður hon avvatnað og viðgjørd á nýggja reinsiverkinum hjá IRF í Nýggjheiðum, og síðani tyrvd í stórsekkjum. Skiftið í rottangaskipanini hevur við sær, at IRF nú fær góð og nágreinilig hagtøl fyri nøgdirnar av evju. Frá og við 2023 fer øll rottangaevja úr Tórshavnar kommunu eisini til Nýggjheiðar. Sostatt verður øll rottangaevja í Føroyum nú viðgjørd, reinsað, avvatnað og tyrvd í Nýggjheiðum. Øll hini evjuplássini kring landið verða við tíðini niðurløgd.

**Talva 19** – Rottangatøming 2019-2023 í IRF-økinum

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av tømdum tangum | 4.595 | 3.931 | 7.562 | 7.834 | 11.716 | 7.128 |
| Samlað tal av tangum pr. 1. januar | 12.167 | 12.433 | 12.761 | 13.114 | 13.378 | 12.771 |
| Tal av tømdum tangum í % | 38 % | 32 % | 59 % | 60 % | 88 % | 56 % |




**Talva 20** – Nøgd av rottangaevju viðgjørd á reinsiverkinum í Nýggjheiðum (tons)

| Viðgjørd evja | 2023 |
|---|---|
| Viðgjørd rottangaevja | 1.024 |

## Um hagtølini

Hagtølini omanfyri fevna bert um alt tað burturkastið, sum IRF hevur tikið ímóti og hagreitt. Tað er nógv annað burturkast í Føroyum. Sum dømi kann nevnast tað burturkastið, sum Kommunala brennistøðin í Tórshavnar kommunu tekur ímóti, og eisini tað burturkastið, sum fleiri fyritøkur sjálvar senda av landinum til endurvinningar, t.d. metal, net, nótir, elektronikkur og klæði.

## Niðurstøða

Samanumtikið vísa nýggjastu hagtølini, at tað spakuliga gongur rætta vegin í mun til langtíðarmálini hjá IRF fyri 2030.

Um málið fyri 2030 um at endurvinna í minsta lagi 50 % av øllum burturkastinum skal røkkast, skulu munagóð átøk gerast næstu seks árini.

Um góða gongdin í mun til brenniburturkastið heldur fram, er tað møguligt at røkka málinum fyri 2030, sum er at brenna í mesta lagi 47 % av burturkastinum.

Nøgdin at tyrva er økt nakað seinasta árið, men sum greitt frá omanfyri, er henda økingin ikki ein avleiðing av, at tað hevur gingið skeivan vegin við nøgdunum at brenna og endurvinningarpartinum. Økingin er eitt úrslit av, at óvanliga nógv tyrviburturkast kom inn í 2023, og hesum fær IRF ikki stýrt. Økingin er møguliga ein ábending um, at málið um at tyrva í mesta lagi 3 % av burturkastinum í 2030 skal endurskoðast.

# HENDINGAR Í ÁRINUM







# Áhugin at vitja IRF veksur støðugt

Talið av fólki, sum vitja støðina hjá IRF úti á Hagaleiti, er vaksið støðugt seinastu árini, og í fjør var einki undantak. Á hvørjum ári eru alsamt fleiri næmingar, stovnsbólkar, kommunur og fyritøkur, sum vitja IRF á Hagaleiti, og í fjør vóru eisini fleiri vitjanir á støðini í Nýggjheiðum bæði av næmingum og fyritøkum.

### Nógv fitt og skilagóð børn á vitjan

Eins og í 2022 bjóðaði IRF í 2023 øllum skúlabólkum og forskúlum í limakommununum á vitjan á Hagaleiti, og tey fingu eisini bjóðað at fáa IRF-spøl og uppgávuheftir. Fleiri bólkar tóku av tilboðnum, men hesi børnini eru tó bert ein lítil partur av øllum teimum gestunum, sum vitjaðu IRF í fjør.

Børn og ung í øllum aldursbólkum, frá barnagarðsbørnum til miðnámsnæmingar, leita sær út á Hagaleiti at hoyra um, hvar burturkastið í Føroyum endar, og hvussu tað verður hagreitt.

**Í fjør vóru 48 bólkar við tilsamans 631 børnum og ungum á vitjan hjá IRF**

Børnini koma úr øllum økjunum hjá IRF frá Norðoyggjum til Vágar og heilt til Suðuroyar – ofta við eldhugaðum og umhvørvistilvitaðum námsfrøðingum ella lærarum á odda, sum hava fyriskipað túrin.

### Fleiri fyritøkur, stovnar og kommunur á vitjan

IRF hevur sett sær sum mál, at skeivar skiljingar frá vinnuni skulu minka munandi, og tí setti IRF í 2023 eitt starvsfólk at taka sær av allari ráðgeving innan skiljing hjá fyritøkum og stovnum.

Alsamt fleiri arbeiðspláss vilja fegin í gongd við at skilja meira, men ofta eru nógv ivamál um skiljing og spurningar av ymiskum praktiskum slagi. Nú hevur IRF betri møguleika at lofta nógvu fyrispurningunum, sum koma frá vinnuni, og nú verður eisini gjørt eitt uppsøkjandi arbeiði á hesum økinum, har ymiskir bólkar verða bodnir at vitja IRF. Av tí sama hava fleiri kommunur, dagstovnar og onnur arbeiðspláss verið á vitjan hjá IRF í 2023 enn undanfarin ár. Í 2023 vóru 165 starvsfólk frá 14 ymiskum fyritøkum ella stovnum, sum vóru á vitjan hjá IRF.

### Øll fáa okkurt burturúr

Vitjanirnar verða altíð lagdar soleiðis til rættis, at gestirnir, bæði stórir og smáir, fáa sum mest burturúr.

Vitjanin byrjar við eini framløgu, og síðani verður farið runt til brennistøð, móttøkuhøll, endurvinningarhøll, oljureinsiverk og serhøll.

Øll halda tað vera sera áhugavert at síggja, hvagar alt burturkastið fer. Vitjanin gevur gestunum nýggja vitan um burturkastøkið í Føroyum, og tá ið tey hava møtt teimum fólkunum, sum dagliga handfara burturkastið, fáa tey eisini eina størri virðing fyri hesum arbeiðinum.



# Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum á vitjan

Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, var á vitjan hjá IRF í 2023. Á burturkastøkinum eru nógvar avbjóðingar, men eisini nógvir møguleikar til menning frameftir, t.d. endurvinning av matleivdum, fleiri skiljingar av húsarhaldsburturkasti, og endurvinning av fleiri bólkum av vinnuburturkasti.

Fyri at fremja broytingar á burturkastøkinum er sera týdningarmikið við góðum samstarvi millum kommunala myndugleikan og landspolitisku skipanina. Neyðugt er eisini við tryggum kørmum innan burturkastøkið, og IRF gleðist um, at Umhvørvismálaráðið er í gongd við at gera eina nýggja kunngerð um burturkast, sum kann stuðla arbeiðinum frameftir.





# IRF vitjar miðnámsskúlar

Í 2023 luttók IRF fyri fyrstu ferð í kunningartiltaki fyri lesandi á Glasi og á Miðnámi á Kambsdali.

Endamálið við at luttaka í slíkum tiltøkum er at vísa teimum ungu á møguleikan at søkja summarstarv hjá IRF og at vísa teimum á samstarvsmøguleikar um verkætlanir og uppgávur.

Tiltøkini vóru sera væleydnað. Næmingarnir smædd-ust ikki burtur og høvdu nógvar spurningar um burturkastøkið í Føroyum. Tey ungu eru sera tilvitað um umhvørvið, og í fjør fekk IRF fleiri fyrispurningar í sambandi við verkætlanir og uppgávuskriving.




*Suffía Høj og Sissal Evudóttir Lervig umboðaðu IRF á miðnámsskúlunum.*

# Fleiri ung í summarstarvi hjá IRF

Hvørt ár í juni, juli og august eru fleiri ung í summar-starvi hjá IRF. Tí hóast fleiri av starvsfólkunum hjá IRF fara í feriu hesa tíðina, skal IRF framvegis hagreiða alt burturkastið, sum kemur inn. Til hetta eru tey ungu fólkini røsk at hjálpa, og tey lata væl at arbeiðinum.

### Nógv søkja summarstarv

Ymisk summarstørv eru hjá IRF bæði við innsavning, skiljing, viðlíkahaldi og koyring. Sambært Suffíu Høj, HR-leiðara hjá IRF, komu oman fyri 50 umsóknir inn í 2023, so tað var torført at velja millum allar umsøkj-ararnar. *„Tað er gleðiligt, at so nógv søkja summar-starv, og at fleiri søkja ár um ár. Vit vildu fegin givið fleiri møguleikan, men hesa ferð var pláss fyri 17 summarfrítíðaravloysarum,“* sigur Suffía. *„Vit hava eina stóra uppgávu at fáa ung fólk at hugsa um burtur-kastøkið og umhvørvið sum heild. Tað er sera týdning-armikið at fáa tey ungu í summarstarv hjá okkum, og møguliga síggja vit tey aftur einaferð seinni, tá ið tey fara at søkja sær eitt fulltíðarstarv.“*

IRF roynir at gera nógv burturúr at seta summarfrítíðar-avloysararnar væl inn í uppgávurnar. Skipað verður m.a. fyri einum kunningardegi, tá ið tey byrja, so tey eru væl brynjað til starvið og fáa eina breiða vitan um burturkastøkið og virksemið hjá IRF.



*Mattias Jansson í Lambanum, Rói Gøte og Sunniva Lamhauge Leo standa við skiljibandið og syrgja fyri, at burturkastbólkarnir, sum fara til endurvinningar, eru so væl skildir sum gjørligt. Tey skilja m.a. papp, pappír, bleytt plast, plastfløskur, blikk og stór-sekkir.*




# Nýggj skiljiskjátta á irf.fo

IRF hevur ment eina nýggja skiljiskjáttu, sum skal gera tað lættari fyri øll at skilja burturkastið rætt. Hetta er nakað, sum bæði borgarar og fyritøkur hava spurt eftir.

Sniðið á skjáttuni er einfalt, og stórur dentur er lagdur á, at tað skal vera skjótt og lætt at finna útav, hvussu tú burturbeinir júst tað, sum tú ivast í.

Tað er lætt at brúka skiljiskjáttuna bæði á teldu og telefon, sama um tú arbeiðir á eini skrivstovu, stendur á einum byggiplássi ella ert heima í køkinum.

Tá ið tú kemur inn á skiljiskjáttuna, kanst tú skriva eitt leitorð í teigin ovast, ella tú kanst leita í teimum bólkunum, sum eru gjørdir frammanundan. Til flestu uppsløgini kanst tú lesa meira um burturkastbólkin, síggja myndir v.m.

### Lættari at skilja hjá vinnuni

Skiljiskjáttan er eitt sera gott amboð hjá vinnuni. Bæði byggi- og sjóvinnan hava t.d. nógvar serstakar burturkastbólkar, og nú er skjótt at fáa eitt yvirlit yvir hesar

# IRF-dagur fyri nýggj starvsfólk

Í 2023 varð fyri fyrstu ferð skipað fyri tiltaki fyri øll nýggj starvsfólk hjá IRF. Tiltakið var á skrá tvær ferðir í 2023, og tilsamans luttóku 14 nýggj starvsfólk.

Endamálið við hesum nýggja tiltakinum er:

- at geva starvsfólki okkara vitan um IRF í breiðari merking
- at geva starvsfólkunum innlit í onnur øki enn tað, sum er teirra dagliga arbeiðsøki

Fyrru helvt av degnum eru framløgur á skrá, har leiðsla og starvsfólk hjá IRF greiða frá um virksemið hjá IRF í dag, menningina á burturkastøkinum, umhvørvispolitikkin, ISO-mál, marknaðarføring og kunningarátøk, intranetið og aðrar KT-skipanir, KT-atferð, arbeiðstrygd og trivnaðarátøk. Eisini verður tosað um, hvat tað merkir at vera starvsfólk hjá IRF.

Dagarnir eydnaðust sera væl, og teir góvu nýggju starvsfólkunum møguleika at heilsa upp á hvønn annan millum arbeiðsøkini og eisini høvi at heilsa upp á leiðsluna.




bólkar, og hvussu teir skulu skiljast. Á forsíðuni á skiljiskjáttuni ber t.d. til at velja undirbólkin 'byggiburturkast' fyri at lesa meira um skilјing av byggitilfari. Niðast á forsíðuni kanst tú eisini velja t.d. 'sjóvinna' og lesa meira um skiljing av boyum, trolum, línum o.s.fr.

Skiljiskjáttan verður eisini brúkt innanhýsis hjá IRF sum amboð til at vegleiða og svara fyrispurningum. IRF miðar eftir, at skiljiskjáttan javnan verður dagførd, og nýggj uppsløg verða løgd afturat, so hvørt sum tey gerast viðkomandi.



*Andrias Joensen, tekniskur leiðari, vísti nýggju starvsfólkunum runt á Hagaleiti.*




# Nýggjur faldari frá IRF

IRF hevur gjørt ein faldara, sum greiðir frá, hvussu tú skilir burturkastið við hús í reyða, hvíta og gráa posan og til kommunala endurvinningarplássið. Í 2023 varð faldarin borin út til øll húsarhald í økinum hjá IRF, og hann er eisini tøkur á heimasíðuni hjá IRF. Harumframt er faldarin gjørdur á enskum, soleiðis at allir útlendskir borgarar og eisini ferðafólk kunnu læra at skilja burturkast rætt.

Hóast føroysk húsarhald enn ikki hava eins nógvar skiljimøguleikar við hús sum húsarhaldini í grannalondum okkara, kunnu nógv okkara longu nú skilja nógv meira, enn vit gera í dag, og tí hevur IRF gjørt henda faldaran.

### Vit skulu endurvinna meira

Tess betur burturkastið verður skilt, tess meira tilfar fáa vit sent til endurvinningar heldur enn at brenna ella tyrva tað.

IRF hevur sett sær sum langtíðarmál, at í 2030 skal 50 % av øllum burturkastinum í Føroyum endurvinnast. Í dag endurvinna vit á leið 30 %, so tað er eitt framsøkið mál, men væl gjørligt, um borgarar, vinnulív og politikarar lyfta uppgávuna í felag.

# Tiltak fyri kommunal bingju- og endurvinningarpláss

Í heyst skipaði IRF fyri afturvendandi tiltakinum, har starvsfólk frá kommunalu bingju- og endurvinningarplássunum kring landið og umboð úr bý- og bygdaráðum komu saman. Virksemið hjá IRF fevnir um allar Føroyar – frá norðasta horni til sunnasta spíssin, og tað er ikki á hvørjum degi, at partarnir fáa høvi at møtast.

Tiltakið byrjaði úti á Gjógv í Sandavági við framløgum, og síðani var farið til nýggju tyrvimóttøkuna og reinsiverkið í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík.

Andrias Joensen, tekniskur leiðari hjá IRF, legði fram um støðina í Nýggjheiðum, og Jóannes Guttesen, umhvørvisleiðari, setti fokus á skiljing av tyrviburturkasti. Hans Andrias Didriksen, leiðari í Nýggjheiðum, vísti runt á støðini.

Undirtøkan fyri tiltakinum var sera góð við umleið 60 luttakarum, og flestu limakommunurnar vóru umboðaðar. Uppgávan at vegleiða borgararnar um burturkast er ómetaliga stór, og starvsfólkini úti á plássunum gera eitt megnar arbeiði. Tað er týdningarmikið, at teirra vitan um burturkast og skiljing er fullfíggjað og dagførd, soleiðis at tey fáa vegleitt borgararnar so væl sum gjørligt. Tað er eisini týdningarmikið, at tey hava bestu umstøðurnar at virka undir, og at kommunalu plássini verða dagførd og útbygd.




*Hans Andrias Didriksen vísti runt á støðini í Nýggjheiðum.*



*Flestu limakommunurnar vóru umboðaðar til tiltakið.*



# Kanning av gráa posa

Í fjør gjørdi fyritøkan SMJ eina kanning fyri IRF av innihaldinum í gráa posanum. Endamálið var at kanna, hvat verður latið í gráa posan, og um okkurt av hesum kundi verið farið til endurvinningar í staðin.

134 posar frá húsarhaldum í meginøkinum vórðu kannaðir. Kanningin vísti m.a., at miðalvektin á gráa posanum er 9,5 kg, 50 % av innihaldinum er matur/lívrunnið tilfar, og fleiri húsarhald brúka ikki hvíta posan.

### Matleivdir nógv tann størsti bólkurin

Innsavnaða burturkastið varð skilt í átta høvuðsbólkar: papp og pappír, metal, glas, hart plast, bleytt plast, matleivdir, serburturkast og restburturkast. Tá ið alt innihaldið í posunum var skilt sundur, vóru bunkarnir sera ymiskir í støðd, men nógv tann største bunkin var matleivdir. Heili 50 % av vektini í gráu posunum var matur/lívrunnið tilfar.

### Hvíti posi ov lítið brúktur

Kanningin vísti eisini, at bert 40 % av húsarhaldum nýta hvíta posa. Hetta er sjálvsagt alt ov lítið, men atlit skal eisini takast til, at summi húski lata hvíta posa inn á kommunala endurvinningarplássið heldur enn at seta posan út til innsavningarbilin at taka, og tískil er veruliga talið av hvítum posum pr. borgara væntandi hægri.

### Hvat kunnu úrslitini brúkast til?

Kanningin í 2023 var tann fyrsta av sínum slagi hjá IRF, og tað er øgiliga áhugavert at fáa hesi hagtølini til høldar.

Árliga fær IRF nógvar fyrispurningar um, hvussu nógv burturkast føroysku húsarhaldini hava, hvussu nógv av burturkastinum er matur, og um vit eru nóg røsk at skilja í Føroyum. Við kanningum sum hesari fáa vit svarað hesum spurningunum.

Ætlanin er at endurtaka kanningina árliga ella annaðhvørt ár, soleiðis at vit hava møguleika at kanna, um vit betra okkum á økinum, og vit fáa møguleika at meta um, hvussu stóran mun ymisku kunningarátøkini og tiltøk gera.



*Ein miðnámsskúla-flokkur av Kambsdali hjálpti okkum at skilja burturkastið.*



*Innsavnararnir Jóhannes Simonsen og Markus Olsen heintaðu posarnar til kanningina.*



*Súsanna Joensen, Sigmar Davidsen, Jóhanna Katrina Bjartalíð og Marjun Hansen, sum starvast á koyrideildini og í køkinum hjá IRF.*

# Týdningarmesta tilfeingið hjá IRF er starvsfólkini

Heimurin gerst ikki burðardyggari av øllum tí, sum verður sagt, men av øllum tí, sum verður gjørt. Starvsfólkini hjá IRF gera hvønn dag eitt arbeiði av alstórum umhvørvisligum týdningi. Starvsfólkaøkið hjá IRF er nógv uppraðfest seinastu árini, og tað er eisini partur av umhvørvispolitikki felagsins støðugt at arbeiða við at fáa starvsfólk at trívast og at førleikamenna starvsfólkini.

Seinasta árið hava m.a. tvey nýggj starvsfólkaskeið verið á skrá – annað í skynsamari koyring og hitt í skiljing av endurvinningartilfari.

### Bilførarar á skeið í skynsamari koyring

Í fjør varð sjóneyka sett á frálæru í skynsamari koyring fyri bilførarar. Tíggju bilførarar hjá IRF vóru við á skeiðnum, sum var eitt samstarv millum Poul Michelsen, Faroe Ship og IRF. Skeiðshaldarin var danska fyritøkan Dekra.

Skeiðið varð skipað sum ein samanseting av ástøðiligari undirvísing og verkligari undirvísing í bilinum, har undirvísarin koyrdi saman við bilføraranum eina løtu á dagligu rutuni.

Luttakararnir lótu væl at skeiðnum og hava broytt atferð í mun til ikki at lata bilin standa í tómgongd. Eisini lærdu teir, at tað loysir seg betur at koyra við javnari ferð, heldur enn at koyra við fullari ferð og síðan seta ferðina niður. Skeiðið gav eisini høvi at sparra við aðrar bilførarar, og tað var sera læruríkt.

IRF hevur seinastu árini arbeitt miðvíst við einari ætlan at minka um oljunýtsluna hjá bilunum. Fleiri átøk hava verið sett í verk, og IRF kann í dag vísa á eina minking í nýtsluni.



*Thomas Jensen frá Stena Recycling greiðir frá um skiljing av elektronikki.*

Umframt skeiðið í skynsamari koyring eru fleiri av rutunum hjá bilunum umlagdar við tí fyri eyga at minka um óneyðuga koyring. Síðst, men ikki minst, hevur IRF seinastu árini eisini lagt seg eftir at keypa bilar, sum eru umhvørvisvinarligari og brenna minni.

### Skeið í skiljing av endurvinningartilfari

Thomas Jensen frá donsku fyritøkuni Stena Recycling var á Hagaleiti og helt skeið fyri starvsfólkum hjá IRF og KB. Skeiðið snúði seg um, hvussu vit skilja papp, pappír, plast, elektronikk og metal. M.a. vórðu hesir spurningarnir viðgjørdir:

- Hvat kann endurvinnast?
- Hvussu skulu vit skilja fyri at endurvinna sum mest?
- Hvar endar tað, sum vit senda av landinum, og hvussu kunnu vit tryggja okkum, at tað verður endurvunnið og ikki brent?

Ein stórur partur av tí, sum IRF sendir av landinum til endurvinningar, fer til Stena Recycling. Tískil er tað sera viðkomandi og ikki minst áhugavert at fáa innlit í teirra virksemi og at kunna seta teimum spurningar. Við hesum skeiðnum fingu starvsfólkini eina vitan, sum gevur dagligu arbeiðsuppgávunum eina størri meining. Starvsfólkini fingu innlit í, hví burturkastið skal skiljast á ein ávísan hátt, og tey síggja nú, hvussu tey kunnu vera við til at virðisøkja tilfeingið í burturkastinum.

At tosa um umhvørvi, burturkast og skiljing fyllir alsamt meira hjá føroyingum, og tí er tað eisini sera gott fyri IRF, at starvsfólkini kunnu svara teimum spurningum og ivamálum, sum tey ofta fáa frá vinum, kenningum og í tí almenna rúminum sum heild.



*Djóni Lava Olsen, sum arbeiðir við serburturkasti hjá IRF.*



# Felags eplavelta á Hagaleiti

Á hvørjum ári verður skipað fyri einum starvsfólkatiltaki, sum á onkran hátt gevur íblástur til ein burðardyggari lívsstíl. Áður hevur verið skipað fyri tálgaverkstovu, fyrilestri um at gagnnýta avroð frá seyði og fyri verkstovu at sáa kryddurtir og salat.

Í mai mánaði í fjør varð skipað fyri at gera felags eplaveltu á Hagaleiti vestan fyri endurvinningarhøllina. Starvsfólkini, sum høvdu hug at luttaka, bjóðaðu eisini familju og vinum við, og samanumtikið var tað ein hugnaligur og læruríkur dagur.

Í oktober vórðu eplini tikin upp. Úrtøkan var sera góð, og hon varð býtt millum tey, sum vóru við til at seta niður.



*Ása Jansdóttir Poulsen, Adam Boyden Joensen og Pól Jóhan Olgarsson Lervig vóru nøkur av børnunum, sum vóru við í lýsingarfilminum. Súsanna Berg vísti teimum runt í endurvinningarhøllini.*

# Nýggjur lýsingarfilmur

Í mai 2023 kom ein nýggjur lýsingarfilmur frá IRF. Filmurin vendir sær til húsarhald og varpar ljós á tað burturkastið, sum vit hava við hús.

## Øll kunnu gera ein mun fyri umhvørvið

Boðskapurin í filminum er, at ábyrgdina fyri umhvørvinum eiga vit øll, og at vit øll kunnu gera ein mun fyri umhvørvið. Tað er kanska ikki altíð tann lættasta loysnin, men tað er tann rætta.

Í filminum verða tríggjar ymiskar gerandisstøður lýstar. Støður, sum flestu føroyingar onkursvegna kunnu kenna seg aftur í. Filmurin er tikin upp heima hjá fólki, í endurvinningarhøllini hjá IRF og á kommunala endurvinningarplássinum í Miðvági.

Filmurin hevur verið nógv at sæð í sjónvarpinum, biografinum og á sosialu miðlunum, og hann hevur verið væl móttikin. Hóast flestøll eru samd um, at vit í Føroyum mugu duga betur at skilja burturkastið, er tað neyðugt, at IRF er ein sjónligur og virkin aktørur í tí almenna rúminum, og áhaldandi minnir føroyingar á týdningin av at skilja burturkastið.



*Filmurin varpar m.a. ljós á týdningin av at skilja burturkastið rætt á kommunalu endurvinningarplássunum.*



*Boðskapurin í filminum er, at vit øll kunnu gera ein mun fyri umhvørvið.*



# 35 ár í starvi hjá IRF

Í september 2023 fylti stjórin hjá IRF, Poul Andrias Joensen, 70 ár. Eftir at hava arbeitt hjá IRF í 35 ár, frá brennistøðin varð tikin í nýtslu í 1989 til í dag, hevur Poul Andrias nú boðað frá, at hann leggur frá sær.

Fyrstu árini hjá IRF starvaðist Poul Andrias sum leiðari á brennistøðini, og í 1992 bleiv hann stjóri í IRF. Poul Andrias stóð sostatt á odda, tá ið allar kommunur og føroyingar sum heild skuldu læra, at burturkast var nakað, sum skuldi savnast inn og gjaldast fyri, heldur enn koyrast á sjógv.

Poul Andrias hevur í fleiri áratíggjur myndað leiðsluna hjá IRF og verið við til ta stóru hugburðsbroyting, sum hevur verið á burturkastøkinum í Føroyum.

Nevnd og starvsfelagar takka Poul Andriasi fyri hansara ómetaliga stóra íkast til IRF og ynskja honum blíðan byr frameftir.

# 25 ára starvsdagar

Tann 22. mai 2023 vóru 25 ár liðin, síðan brøðurnir Torfinnur og Tórhallur Mortensen komu í starv hjá IRF.

Í hesum sambandi varð skipað fyri móttøku á Hotel Tvøroyri. Tað var ein hugnalig løta saman við familju, vinum og starvsfeløgum. Poul Andrias Joensen helt eina røðu og handaði Torfinni og Tórhalli blómutyssir og málningar.

IRF takkar Torfinni og Tórhalli fyri teirra stóra íkast til IRF við ynski um framhaldandi gott samstarv.



# Jóannes Guttesen nýggjur umhvørvisleiðari



21. august 2023 byrjaði Jóannes Guttesen sum umhvørvisleiðari hjá IRF. Hann er útbúgvin laboratoriuteknikari, hevur diplomútbúgving í leiðslu og hevur viðkomandi skeið innan umhvørvisgóðskuskoðan, fyrisiting og verkætlanarleiðslu.

Hann hevur áður starvast sum umhvørvisleiðari og leiðari á Kommunalu brennistøðini hjá Tórshavnar kommunu, og hann hevur eisini starvast á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Umhvørvisleiðarin hjá IRF hevur ábyrgdina av øllum umhvørvisviðurskiftum hjá felagnum og er við til framhaldandi at tryggja grønu kósina hjá IRF saman við leiðslu, deildarleiðarum og starvsfólkum annars.

*„Eg havi altíð havt stóran áhuga í umhvørvis- og burturkastøkinum, og tað verður sera spennandi at arbeiða við munadyggum loysnum innan fyribyrging, innsavning og hagreiðing av burturkasti. Tað er sera týdningarmikið, at bæði borgarar, vinna og politiskir myndugleikar eru við til at minka um, hvussu nógv burturkast verður framleitt. Tí næst skulu vit arbeiða fram ímóti at endurnýta og endurvinna so nógv av burturkastinum sum gjørligt. Eg gleði meg at herja á hesa uppgávu saman við dugnaliga starvsfólkahópinum hjá IRF,“* sigur Jóannes Guttesen.



# Grønlendsk kommuna leitaði sær íblástur hjá IRF

Avannaata Kommunia, sum er tann norðasta kommunan í Grønlandi, var millum gestirnar á Hagaleiti í 2023. Avannaata Kommunia umfatar 4 býir og 20 bygdir frá Ilulissat til Thule.

Kommunan er tann einasta av teimum fimm kommununum í Grønlandi, sum ikki er við í burturkastfelagnum Esani. Teirra avbjóðing er, at ísurin ger, at tey ein stóran part av árinum ikki fáa flutt burturkast úr nógvum bygdum og býum. Tá mugu tey pakka burturkastið niður, og tað hevur m.a. við sær flugutrupulleikar. Teirra brennistøð í Ilulissat hevur ov lágan hita og skal steingjast í 2024, so nú mugu tey finna eina nýggja loysn. Ynskið hjá teimum er at endurvinna meira heldur enn at brenna alt burturkastið.


ONE

# Høvuðstøl í 1.000 kr

| | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 |
| Aðrar inntøkur | 80.430 | 74.782 | 72.842 | 67.842 | 62.135 |
| **Inntøkur tilsamans** | **121.767** | **115.759** | **112.770** | **107.248** | **101.524** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 97.091 | 93.397 | 87.098 | 85.250 | 80.317 |
| Avskrivingar | 17.567 | 18.554 | 18.131 | 18.139 | 16.158 |
| Rentuútreiðslur | 7.064 | 3.631 | 3.013 | 3.129 | 3.174 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **121.722** | **115.582** | **108.242** | **106.518** | **99.649** |
| | | | | | |
| **Úrslit** | **45** | **177** | **4.528** | **730** | **1.875** |
| | | | | | |
| **Eginogn** | **74.726** | **74.681** | **74.504** | **69.976** | **69.246** |



## Inntøkur 2023–2019




| Inntøkur | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunugjøld | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 |
| Aðrar inntøkur | 80.430 | 74.782 | 72.842 | 67.842 | 62.135 |

## Útreiðslur 2023–2019




| Útreiðslur | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 97.091 | 93.397 | 87.098 | 85.250 | 80.317 |
| Avskrivingar | 17.567 | 18.554 | 18.131 | 18.139 | 16.158 |
| Rentuútreiðslur | 7.064 | 3.631 | 3.013 | 3.129 | 3.174 |

## Ársúrslit 2023–2019




| | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrslit | 45 | 177 | 4.528 | 730 | 1.875 |

## Eginogn 2023–2019




| | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 74.726 | 74.681 | 74.504 | 69.976 | 69.246 |


33

# Gongdin í rakstrinum í 1.000 kr

| | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 41.337 | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 |
| Virkisburturkast v.m. | 64.901 | 57.193 | 54.683 | 53.137 | 49.740 |
| Oljureinsiverkið | 7.876 | 6.885 | 6.673 | 9.551 | 6.876 |
| Verkstaður | 581 | 1.225 | 896 | 1.199 | 1.027 |
| Søla | 7.072 | 9.479 | 10.590 | 3.955 | 4.492 |
| **Inntøkur tilsamans** | **121.767** | **115.759** | **112.770** | **107.248** | **101.524** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.797 | 1.770 | 1.612 | 1.716 | 1.979 |
| Lønarútreiðslur | 38.441 | 36.381 | 34.378 | 32.805 | 30.722 |
| Orka | 3.996 | 3.345 | 3.046 | 2.962 | 2.889 |
| Tilfar | 3.361 | 3.506 | 2.303 | 2.628 | 2.584 |
| Flutningur | 13.774 | 13.468 | 13.328 | 11.390 | 11.480 |
| Viðgerð uttanlands | 1.202 | 946 | 358 | 729 | 613 |
| Tyrvingarpláss | 5.238 | 4.503 | 5.392 | 5.553 | 5.129 |
| Størri amboð | 9.444 | 9.979 | 9.011 | 8.632 | 8.843 |
| Skrivstovuhald | 3.697 | 3.507 | 3.358 | 4.526 | 3.854 |
| Maskinanlegg | 3.138 | 4.032 | 2.816 | 2.626 | 2.226 |
| Bygningsumsiting | 738 | 492 | 503 | 650 | 304 |
| Verkstaður, PLC v.m. | 980 | 749 | 616 | 756 | 587 |
| Ferðing og umboðan | 1.467 | 1.137 | 1.035 | 1.391 | 1.302 |
| Uttanhýsistænastur | 1.511 | 1.829 | 2.048 | 1.392 | 1.306 |
| Tryggingar | 1.257 | 1.041 | 1.160 | 1.379 | 977 |
| Starvsfólkaútreiðslur | 7.050 | 6.712 | 6.134 | 6.115 | 5.524 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **97.091** | **93.397** | **87.098** | **85.250** | **80.317** |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **24.676** | **22.362** | **25.672** | **21.998** | **21.207** |
| | | | | | |
| **Avskrivingar** | **17.567** | **18.554** | **18.131** | **18.139** | **16.158** |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **7.109** | **3.808** | **7.541** | **3.859** | **5.049** |
| | | | | | |
| **Rentur** | | | | | |
| Bankarentur og provisión v.m. | 47 | 42 | 33 | 105 | 15 |
| Prioritetsrentur | 7.111 | 3.589 | 2.980 | 3.024 | 3.159 |
| **Rentur tilsamans** | **7.064** | **3.631** | **3.013** | **3.129** | **3.174** |
| | | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **45** | **177** | **4.528** | **730** | **1.875** |

# Rakstrarúrslit samanborið við fíggjarætlan í 1.000 kr

| | Roknskapur | Ætlan | Frávik | Frávik í % |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | |
| Kommunugjøld | 41.337 | 41.324 | 13 | 0,0 % |
| Virkisburturkast v.m. | 68.777 | 66.761 | 2.016 | 3,0 % |
| Landsstýrisgjald | 4.000 | 4.000 | - | 0,0 % |
| Verkstaður | 581 | 1.239 | 658 | -53,1 % |
| Søla | 7.072 | 7.298 | 226 | -3,1 % |
| **Inntøkur tilsamans** | **121.767** | **120.622** | **1.145** | **0,9 %** |
| | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.797 | 1.792 | 5 | 0,3 % |
| Lønarútreiðslur | 38.441 | 37.685 | 756 | 2,0 % |
| Orka | 3.996 | 4.283 | 287 | -6,7 % |
| Tilfar | 3.361 | 4.650 | 1.289 | -27,7 % |
| Flutningur | 13.774 | 13.285 | 489 | 3,7 % |
| Viðgerð uttanlands | 1.202 | 520 | 682 | 131,2 % |
| Tyrvingarpláss | 5.238 | 6.255 | 1.017 | -16,3 % |
| Størri amboð | 9.444 | 10.312 | 868 | -8,4 % |
| Skrivstovuhald | 3.697 | 3.416 | 281 | 8,2 % |
| Maskinanlegg | 3.138 | 3.323 | 185 | -5,6 % |
| Bygningsumsiting | 738 | 618 | 120 | 19,4 % |
| Verkstaður, PLC v.m. | 980 | 678 | 302 | 44,5 % |
| Ferðing og umboðan | 1.467 | 1.447 | 20 | 1,4 % |
| Uttanhýsistænastur | 1.511 | 1.400 | 111 | 7,9 % |
| Tryggingar | 1.257 | 1.303 | 46 | -3,5 % |
| Starvsfólkaútreiðslur | 7.050 | 7.645 | 595 | -7,8 % |
| **Útreiðslur tilsamans** | **97.091** | **98.612** | **-1.521** | **-1,5 %** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **24.676** | **22.010** | **2.666** | **12,1 %** |
| | | | | |
| **Avskrivingar** | **17.567** | **15.500** | **2.067** | **13,3 %** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **7.109** | **6.510** | **599** | **9,2 %** |
| | | | | |
| **Rentur** | | | | |
| Bankarentur og provisión v.m. | 47 | - | 47 | 0,0 % |
| Prioritetsrentur | 7.111 | 6.405 | 706 | 11,0 % |
| **Rentur tilsamans** | **7.064** | **6.405** | **659** | **10,3 %** |
| | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **45** | **105** | **-60** | **-57,1 %** |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2023 hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Klaksvík, tann 30. apríl 2024

**Stjórn:**

**Poul Andrias Joensen**
Stjóri

**Nevnd:**

**Gunvá við Keldu**
Nevndarforkvinna

**Oluf Müller**
Næstformaður

**Hans Anders Jacobsen**
Nevndarlimur

**Alvi Mortensen**
Nevndarlimur

**Jóanis Albert Nielsen**
Nevndarlimur

**Bjarki Henriksen**
Nevndarlimur

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## Til eigararnar í L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF)

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) fyri roknskapaárið 1. januar - 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti „Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin“. Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants’ um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapurin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapurin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur,

umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

